Fylgiskjal 34

almannaverkið

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Tórshavn, tann:** 17. januar 2020
**J.nr.:** 002.K04-0072/18-8
(at tilskila í svari)

**Tygara skriv.:** 19/00971

**Viðgjørt:** Janus Hentze í Stórustovu

**Uppskot til tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin**

Almannaverkið hevur tann 23. desember 2019 móttikið omanfyri nevnda uppskot til hoyringar. Uppskotið um tvingsilslóg hevur verið til hoyringar fyrr, og vil Almannaverkið vísa til hoyringssvar dagfest 14. september 2018. Uppskotið er nú sent til hoyringar av nýggjum við nøkrum broytingum, og Almannaverkið hevur hesar viðmerkingar til broytingaruppskotini:

Viðvíkjandi ásetingini um ávaringar- og peiliskipanir í § 8 hevur Almannaverkið áður mælt til, at persónsskarin verður víðkaður til somuleiðis at fevna um persónsskaran í barnaverndarlógini. Í hoyringssvarinum til tvingsilslógina, dagfest 14. september 2018 skrivar Almannaverkið, at tørvur er á ávaringarskipanum, t.d. alarmum og sensorum á hurðum og vindeygum, soleiðis at starvsfólk verða varug við, at børn møguliga eru rýmd av stovninum ella møguliga eru farin inn í kamar hjá øðrum barni. Almannaverkið ger somuleiðis vart við hetta í hoyringssvari til broytingar í barnaverndarlógini, ið somuleiðis varð sent Almannamálaráðnum tann 14. september 2018, har viðmerkt verður, at børn kunnu rýma um náttina ella gera seg inn á onnur børn á náttartíð. Upplýst verður, at skipanir finnast, har einstakar hurðar/vindeygu kunnu setast til og frá, soleiðis at tað bert verður brúkt, tá tað verður mett neyðugt.

Samstundis framgongur av viðmerkingunum til § 8, at ávaringarskipanir hava sum endamál at ávara onnur um, at ein persónur við týðandi sálarligum virkistarni fer frá einum avmarkaðum øki, ið er trygt, til eitt øki, ið verður mett ótrygt og vandamikið fyri persónin. Tað undrar sostatt Almannaverkið, at Almannamálaráðið í lógaruppskotinum skrivar, at: "*Almannamálaráðið tekur tó ikki undir við, at persónsskarin í løgtingslóg um barnavernd skal hava skipað viðurskifti um GPS í hesum lógaruppskoti. Ávaringar- og peiliskipan er fyrst og fremst egnað sum umsorganarramboð í evsta føri til persónar við sálarligum virkistarni. Ansast má eftir hvørjum endamáli ein slík skipan tænir.*" Almannaverkið hevur onki ynski um at knýta gps-skipan at persónum, ið eru fevndir av persónsskaranum í barnaverndarlógini, og Almannaverkið hevur ikki mælt til at broyta ásetingina soleiðis, at gps-skipan skal kunna knýtast at børnunum. Almannaverkið er framvegis av teirri fatan, at ávaringarskipanir eru neyðugar og viðkomandi í ávísum førum innan barnaverndarøki, har vandi er fyri, at børn rýma, uttan at starvsfólk verða varug við hetta.

Viðvíkjandi heimildini í § 8 um, at avvarðandi kunnu søkja um loyvi til at taka ávaringar- og peiliskipan í nýtslu, kann umhugsast um henda heimild til avvarðandi skal víðkast til ásetingarnar um at halda persóni føstum í sambandi við reinføri og grundleggjandi tørv í § 11 og um nýtslu av hjálparráði at verja móti skaða í § 12. Tá talan t.d. er um demens, og

viðkomandi ikki er á stovni, er tað í stóran mun avvarðandi, ið taka sær av viðkomandi, hóast heimarøkt kemur í heimið.

Í tann mun avvarðandi verða nevnd í lógaruppskotinum eigur verji helst somuleiðis at verða nevndur. Um verji er tilnevndur í persónligum viðurskiftum, ella viðkomandi er ómynduggjørdur verður mett, at tað er verjin, og ikki onnur avvarðandi, ið eiga at hava heimildina.

Somuleiðis eigur verji at verða nevndur í § 24, stk. 1, nr. 7 og stk. 2, nr. 7 umframt stk. 3 og stk. 4.

Vegna Almannaverkið

Janus H. í Stórustovu
fulltrúi